# Undirvísingarætlan fyri skúlaárið 2020/2021

## Undirvísingarfrágreiðing

| | |
|---|---|
| Hold | Tekniski skúli |
| Lærugrein og stig | Sálarfrøði á C stigi |
| Námsætlan | https://namsaetlanir.fo/midnam/laerugreinar/salarfroedi/salarfroedi-c/ |
| Lærari | Annika Steintórsdóttir Biskopstø |
| Tíðarskeið | Skúlaárið 2020-2021 |

| |
|---|
| Lærubókin, ið víst verður til er: Ole Schultz Larsen: ”Psykologiens veje” hjá Systime, útgáva 3. Møguliga okkurrt  nýttt tilfar hjá Nám eisini, sum eitur Hetja. |
| Case-tilfar o.a. frá e-lærubókini verður brúkt, umframt at eg fari at vísa teimum onkran film og hóskandi tilfar á sosialu miðlunum ígjøgnum lestrarárið. |

Yvirlit

| |
|---|
| Undirvísingargongdin verður skipað soleiðis:<br><br>Innleiðsla: Tann margfalda sálarfrøðin<br>Persónsmenskusálarfrøði<br>Psykoanalysan<br>Menningarsálarfrøði og umsorganartrot<br>Læring og kognitión<br>Sosial sálarfrøði<br>Ungdómur, seinmodernitetur og strongd<br>Samskifti |

1. Undirvísingargongd    Innleiðsla – Tann margfalda sálarfrøðin

| | |
|---|---|
| Innihald og førleikamál | Grundleggjandi um lærugreinina og um innlæring |
| Tilfar | Kap. 1 og 2.<br><br>I innleiðsluni hava vit lagt dent á hvussu ein arbeiðir við fakinum. Næmingar fáa innlit í grundleggjandi søguna og hugtøkum innan sálarfrøði.<br>Næmingarnir lesa um ymiskar vinklar innan sálarfrøðina fyri at síggja hvussu teoriir'nar hvør í sínum lagi kunnu hava ymiskar frágreiðingar uppá eitt fyribrigdi.<br><br>Vit hava lagt dent á at tað ikki er <u>ein</u> uppfatan, men at tað finnast ymsikar áskoðanir, uppfatanir og siðvenjur.<br><br>Vit fara at arbeiða við korona-problematikkinum frá ymsum sálarfrøðiligum perspektivum. |
| Longd (tal av blokkum) | 4 |

2. Undirvísingargongd    Persónsmenska

| | |
|---|---|
| Innihald og førleikamál | At fáa innlit í ymiska ástøði um persónmensku. At royna testir og kjakast um virði í teimum, m.a. the big Five og 16 personalities. Vit hava somuleiðis tosað um ta váðafúsu og varnu persónligheitstýpuna og hugt eftir hvussu samfelagið í dag er innrættað og í ein ávísan mun tilgóðar sær tað ekstroverdu typuna. Har vit hava tosað um skjótleika, stimulatiónsniveu og ymisk rák. |
| Tilfar | Kap. 18 í lærubókini<br>Test 16personalities |
| Longd (tal av blokkum) | 4 |

5. Undirvísingargongd    Psykoanalysan

| | |
|---|---|
| Innihald og førleikamál | At fáa innlit í psykoanalysina søguliga og sálarfrøðiliga. At skilja grundleggjandi hugtøkini, fasurnar, persónligheitsmodellið og verjumekanismurnar hjá Freud og kritikkin av ástøðini.<br><br>Endamálið hevur verið, at næmingarnir megna at:<br>"greiða frá sálarfrøðiligum ástøði og hugtøkum (...) og finna og handfara viðkomandi sálarfrøðiliga vitan til ítøkiligar uppgávur og viðkomandi tilfar, og somuleiðis kritiskt meta um hesa vitan á fakligum grundarlagi."<br><br>Í hesum sambandi hava næmingarnir gjørt upplegg um persónligheitsmodellið og verjumerkanismurnar. |
| Tilfar | Kap. 16 í lærubókini |

| | |
|---|---|
| Longd (tal av blokkum) | 3-4 |

6. Undirvísingargongd Menningarsálarfrøði og umsorganartrot

| | |
|---|---|
| Innihald og førleikamál | At fáa innlit í ymiskt ástøði um menningarsálarfrøði, hvussu smábarnaaldurin er við til at mynda menniskjans persónsmensku. At vísa á avleiðingarnar av umsorganartroti og týdningin av tilknýti. Onnur sentral hugtøk hava verið smábanatunglyndi, hospitalisma og resiliens.<br><br>Endamálið hevur verið:<br><br>“At vísa kunnleika til sálarfrøðiligu kjarnaøkini. At lýsa munir og broytingar í sálarligu menning menniskjans serliga í mun til normalt virkandi menniskja.” |
| Tilfar | Kap. 6., 7. og 8 í lærubókini |
| Longd (tal av blokkum) | Áleið 8 |

7. Undirvísingargongd Læring, kognitón og hugsunarmenning

| | |
|---|---|
| Innihald og førleikamál | At fáa innlit í læringshugtakið við støði í behaviorismuni og í kognitivu sálarfrøðini, ið m.a handlar um uppmerksemi, perseptión, minni og kognitiva terapi. Nøkur av sentralu økinum ella hugtøkunum eru gestaltsálarfrøði, gestaltlógir, informatiónsgongdir og kognitiv skema.<br><br>“At vísa kunnleika á byrjunarstøði um sálarfrøðiligar granskingarhættirnar og kunnleika um siðfrøðiligar spurningar í sálarfrøðiligari gransking. Duga at skilja mun á gerandisligari sálarfrøði og granskingargrundaðari sálarfrøðiligari vitan.”<br>“At greiða frá sálarfrøðiligum ástøði, hugtøkum og kanningum.” |
| Tilfar | Kap. 9 og 11 |
| Longd (tal av blokkum) | Áleið 8 |

8. Undirvísingargongd Sosialsálarfrøði – 12.03.19

| | |
|---|---|
| Innihald og førleikamál | At fáa innlit í ymisk sosialsálarfrøðilig hugtøk og fyribrigdi, so sum bólkar, konformitet, bólkaávirkan, bólkapolarisering, sosialt eftirlit, leiklutir, happing og leiðsluhættir.<br><br>“At greiða frá sálarfrøðiligum ástøði, hugtøkum og kanningum.”<br><br>“At meta um týdningin av mentanarligum tættum í mun til atferð hjá menniskjum.” |
| Tilfar | Kap. 21 |
| Longd (tal av blokkum) | Kap. 7 |

9. Undirvísingargongd Ungdómur, samleiki og strongd

| | |
|---|---|
| Innihald og førleikamál | Ymisk ástøði um menning og týdningin av ungdómsárunum<br>At lýsa ymiskar sálarfrøðiligar spurningar út frá ymiskum sjónarhornum<br>At kanna hvussu fortreytirnar fyri at skapa ein sjálvstøðugan samleika eru broyttar, og hvørjar avbjóðingar ung í dag hava í skiftinum fra barndóminum og vaksinlívið.<br>Eisini hava vit hugt eftir um hugsast kann at ein samanhangur er ímillum tey krøv, ið verða sett til ung og trupulleikar við strongd og sálarligum líðingum. |
| Tilfar | Kjarnutilfar:<br>Kap. 19 og 23. |
| Longd (tal av blokkum) | 8 |

10. Undirvísingargongd Samskiftið

| | |
|---|---|
| Innihald og førleikamál | Hvønn týdning hevur samskifti og ymisk eyðkenni, við denti á ástøði úr bókini. Har hava vit m.a viðgjørt tað verbalu og non-verbalu kommunikatiónina og m.a. hugt eftir tí kropsliga, sosiala, kensluliga og ljóðmessiga samskiftinum. |
| Tilfar | Kjarnutilfar:<br>Kap. 20 |
| Longd (tal av blokkum) | 2 |